


*Sambandið millum meg, Petur og dreingirnir er blivið so mikið sterkt, at teir kalla meg mamma, sigur Stella*

# FØROYINGAR Í HJÁLPARARBEIÐI Í KENYA



FERÐAFRÁSØGN

Sarah Zachariassen og
Bergur Thorsteinsson

Vit vóru í Nakuru í Kenya í summar hjá foreldurunum hjá Sarah, Stella og Petur Zachariassen, ið virka sum trúboðarar í Kenya saman við yngstu dóttur teirra, Kezia.

Stella og Petur fluttu til Kenya í august 2009, eftir at tey sóu hvussu stór neyðin var her eftir valið í 2007, tá ið ófriðurin fór fram. Tey virka ikki innan fyri nakra organisation, men sum sjálvstøðug. Vit bæði fóru so til Kenya í juni, og vórðu har í tveir mánaðir.

Stella og Petur greiða frá at tey hava ymisk projekt koyrandi, so sum at geva gøtudreingjunum mat hvønn mikudag, og hvønn sunnudag eru tey í eini bygd, sum eitur Piavi, har tað er sera fátækt og liggur uttan el og vatn. Har eru sera vánaligir vegir at koma aftur og fram eftir.

Neyðin er stór her í Kenya, tí pengar eru ikki lættir at fáa fatur á. Ein kann so spyrja, hví man vil ofra so nógv fyri at fara til Kenya, hvar tey onki hava. Svarið er einfalt: fyri at boða evangeliið til fólk, sum liva har eingin vón er fyri framman, siga tey.

At geva gøtudreingjunum mat er ikki eitt lætt arbeiði. Teir sniffa lím og kunnu verða vandamiklir, tá ið teir eru skeivir av hesum. Hóast tað er eitt vandamikið arbeiði, hava Stella og Petur ikki givið upp. Dreingirnir hava greitt teimum frá, at fleiri trúboðarar hava roynt samarbeiði, men eru givnir eftir stuttari tíð. Sambandið millum meg, Petur og dreingirnir er blivið so mikið sterkt, at teir kalla meg mamma, sigur Stella.

Vit hava nøkur prosjekt koyrandi, men vit hava tvey serlig prosjekt, har vit ætla at byggja hús til tvær familjur. Eitt gott hús hjá einum lokalum kenyanara, ið minnir um eitt føroyskt seyðahús, kostar bert umleið 15.000 kr. at gera. Vanliga eru hús í bygdunum her gjørd av leiri og lorti. Tey hava moldgólv og standa sum best ber til. Í einum slíkum húsi býr kanska ein familja upp á 9-10